## Nógvar ferðsluvanlukkur í Danmark

Sjálvt um hesin mánaðurin ikki er meiri enn hálvrunnin, hevur ferðslan í Danmark longu kravt 24 mannalív. Serliga ringt var nú á páskum, tá ikki færri enn níggju fólk doyðu í ferðsluvanlukkum. Við Ringsted á Sælandi doyðu fýra ungfólk í einari vanlukku, í Esbjerg doyðu tríggir ungir menn, tá tveir bilar stoyttu saman, sunnan fyri Aalborg doyði ein maður eftir at hava rent á eitt træ, og við Køge bleiv ein maður ákoyrdur, meðan hann gekk á motorvegnum. Við vanlukkunum hesar seinastu dagarnar hevur ferðslan kravt 96 mannalív í Danmark higartil í ár.



## Skerd bløð hesa vikuna

Av tí at Prentmiðstøðin byggir út í løtuni, eru bløðini skerd hesa vikuna. Tað merkir, at Sosialurin og Dimmalætting í mesta lagi kunnu prentast í 32 síðum. Hetta merkir sjálvandi tilfarið í blaðnum hesa vikuna, og biða vit lesarar og lýsarar halda okkum til góðar. Trupult verður tí at hýsa øllum tilfarinum, og vit verða eisini noydd at skerja tað innsenda tilfarið. Ætlandi verður øll útbyggingin liðug um tvær til tríggjar vikur, men roknað verður við, at bløðini kunnu prenta nakrar fleiri síður í næstu viku.

# Ræst at roykja í Klaksvík

**Tað er ikki bert vestmenningar, ið hava góð úrslit við at fáa ungfólk at lata vera við at roykja. Í Klaksvík hava tey helvtað talið av roykjarum í fólkaskúlunum**

ROYKING
Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo



*Við slagorðunum »Tað er ræst at roykja« ganga eisini klaksvíkingar á odda í stríðnum móti tubbakinum. Í dag roykir bert ein av tíggju næmingum í framhaldsdeildini í Klaksvík*

Við slagorðinum »Tað er ræst at roykja« hava klaksvíkingar megnað eitt bragd, ið líkist nógv tí í Vestmanna.

Síðani 2004 er talið av roykjarum í skúlunum á Ziskatrøð og við Ósánna farið í helvt, úr ávikavist 25 og 33,3 prosentum til 13 og 7 prosent.

Dávur Winther, ið er mentanarleiðari í Klaksvíkar Kommunu, greiðir frá, at har hava tey gjørt eitt miðvíst arbeiði síðani 2004 fyri at fáa næmingarnar at lata vera við at byrja at roykja, og at leggja av, um teir eru byrjaðir.

Hetta arbeiði hevur heilt greitt givið úrslit. Tann mest víðgongda broytingin er nokk farin fram í skúlanum við Ósánna, har tað í 2004 var ein av trimum, sum roykti, men har tað í 2008 bert var ein av tíggju næmingum, sum royktu dagliga.

Men eisini á Ziskatrøð er broytingin stór. Har tað áðrenn var ein av fýra, sum royktu, er tað í 2008 bert gott og væl ein av tíggju, sum roykja.

### Ræst at roykja

Dávur Winther greiðir frá, at tey, umframt alt tað vanliga arbeiðið við at upplýsa, eisini skipa fyri einum serligum degi á hvørjum ári.

- Hvørt ár hava vit ein dag, har vit hava nakrar fyrimyndir inni og greiða frá um teirra royndir við royki. Eitt nú hava vit havt Jákup Veyhe, Hanus G. Johansen, The Ghost, Týr og onnur inni og greitt frá, hvussu tey hava upplivað roykingtætt at kroppinum, og hví tey ikki roykja, sigur Dávur Winther.

Hann greiðir frá, at tey hava góðar royndir av hesum degi, sum plagar at vera sera hugnaligur. Hesin dagurin er partur av kampanjuni, sum tey í Klaksvík koyra undir navninum »Tað er ræst at roykja«.

### Heiðra roykfríum flokkum

Hóast tey í Klaksvík enn ikki hava ein heilt roykfrían skúla, eru tey væl á veg, og hava megnað fleiri bragd. Eitt nú vóru í fjør einir fimm til seks flokkar, har eingin roykti.

- Tá hesir flokkarnir hava klárað nakað so flott, so hava vit givið teimum heiðursbrøv afturfyri bragdið. Saman plaga vit so at hava henda eina dagin, har tað er lív í, og har Summarfestivalurin eisini hevur verið inni og hevur lutað bilettir butrur, sigur Dávur Winther.

Hóast tey enn ikki kunnu kalla seg roykfrían skúla, má sigast, at tað er sera flott, at bert ein av tíggju næmingum í framhaldsdeildunum í Klaksvík roykja.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur í stuttari viðmerking, at hann er sera fegin um góða úrslitið, og at hann ynskir teimum tillukku við flotta úrslitinum.

# Hetta er eitt bragd

**At tað eingir næmingar roykja í framhaldsdeildini í Vestmanna Skúla, og at skúlarnir í Klaksvík hava helvtað talið av roykjarum er einki minni enn eitt bragd. Tað sigur Hans Pauli Strøm, ið fegnast gongdina**

ROYKING
Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo



*Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, fegnast um tey góðu úrslitini, ið tey hava fingið í Vestmanna og í Klaksvík. – Hetta er einki minni enn eitt bragd, sigur hann*

Fyri viku síðan varpaði Sosialurin ljós á framhaldsdeildina í Vestmanna Skúla, har tað millum 67 næmingar ikki taldist ein einasti roykjari.

Síðani tá er komið fram, at gongdin er tann sama í Klaksvík. Har hava tey í skúlunum á Ziskatrøð og við Ósánna helvtað talið av roykjarum seinastu fýra árini, úr ávikavist 33,3 og 24,9 prosentum sum roykja dagliga, og niður í 7 og 13 prosent.

Hetta fegnast landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, um. Hann kallar tað eitt satt bragd, at so fá av teimum ungu byrja at roykja.

- Talið av roykjarum millum tey ungu í framhaldsdeildunum kring landið er góð 21 prosent, vísti kanningin í 2007. Og tá talið av roykjarum er so stórt, er tað eitt bragd, at eingin og so fáir næmingar í framhaldsdeildunum roykja, staðfestir Hans Pauli Strøm.

### Fylgja gongdini væl

Hans Pauli Strøm hevur verið landsstýrismaður í heilsumálum síðani 2004. Í 2006 gjørdu teir eina samlaða fólkaheilsuætlan, har eitt av høvuðsmálunum var royking. Tá settu teir sær nøkur mál fyri, hvat teir vildu náa viðvíkjandi royking í øllum landinum.

Teir settu sær fyri, at í 2009 skuldi talið av roykjarum í landinum vera komið niður á 20 prosent. Í 2003, tá seinasta kanningin varð gjørd, var talið av roykjarum í landinum 37 prosent. Í 2008 var talið 25 prosent, og fyri hvørt ár fækkast roykjararnir.

- Harafturat hava vit sett okkum fyri í eini 10-áraætlan, at í 2015 skuldi talið av roykjarum vera komið niður á 15 prosent. Tað er ein øgiliga høg ambitión, men tað er tað, vit miða eftir, og gongdin má sigast vera tann rætta, sigur Hans Pauli Strøm.

### Høvuðsuppgávan er framhaldsdeildirnar

Hans Pauli Strøm er væl vitandi um, at tað eru fólk, ið hava ilt við at leggja av at roykja. Hann staðfestir eisini, at tað er ikki har, høvuðsinnsatsurin skal gerast.

- Tey, sum byrja at roykja, eru vanliga um 13 til 14 árs aldur. Og tey, sum byrja seinni enn tað, vísa seg at hava lættari við at leggja av at roykja. Høvuðsuppgávan hjá okkum er at steðga tí í framhaldsdeildini. Tað er har, »the battleground is«, staðfestir Hans Pauli Strøm.

Hann er eisini sannførdur um, at tað verða nøkur ár enn, áðrenn Føroyar verða roykfríar. Hann leggur eisini dent á, at tað ikki er so umráðandi, hvat tølini siga.

Hann sigur, at tað, sum er mest umráðandi, er at fáa vent gongdini. Tað er ikki so umráðandi fyri hann, hvat tølini siga, men heldur at tað skal blíva natúrligt at ikki roykja, soleiðis at tað ikki følist sum ein jagstran.

Hans Pauli Strøm viðgongur, at hann hevði verið stoltur, um Føroyar gjørdust roykfríar, meðan hann er landsstýrismaður í heilsumálum. Hann væntar tó, at tað verða nøkur ár enn, áðrenn tað verður veruleiki, men fegnast um at tað gongur tann rætta vegin. Æruna fyri hetta gevur hann býráðum, skúlum, foreldrum og næmingum, fyri eitt gott og miðvíst arbeiði.

### Gratulerar Vestmanna Skúla

Í lesarabrævi á síðu 12 í hesum blað, ynskir Hans Pauli Strøm persónliga næmingunum og skúlanum í Vestmanna tillukku við bragdinum. Les meira á síðu 12.